Eftirlitsmaður

Søkt verður eftir eftirlitsmanni til setan fyrst í komandi ári.

Uppgávan:
Uppgávan snýr seg um regluligt eftirlit við akførum, sum verða boðað til sýn. Starvið fevnir um øll eftirlitsstøð stovnsins, sum verða røkt út frá høvuðsdeildini í Tórshavn. Frammanundan eru 5 fólk í starvi á deildini.

Førleikakrøv:
Vit hugsa okkum ein persón við bilmekanikaraútbúgving og hollum royndum innan økið. Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur royndir sum lastbilamekanikari.
Dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir og at viðkomandi er fyrikomandi, men kortini kann fremja eftirlitsarbeiðið á ein myndugan hátt.
Tað er ein fyrimunur um viðkomandi hevur teldukunnleika og koyrikort til lastbil/buss og stóran viðfestivogn.

Setanartreytir:
Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvssetanin hoyrir undir Vinnumálastýrið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri. Setanin er treytað av endaligari játtan.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til tlf. 350400 og tosa við Búgva Apol, deildarleiðara. Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum, skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 3. desember 2001.

Bileftirlit Føroya
Hoyviksvegur 57
Postsmoga 3206
110 Tórshavn

Bileftirlit Føroya er stovnur undir Vinnumálastýrinum og hevur sum endamál at fremja akfaatøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stíla fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn hevur Bileftirlitið sýnsdeildir um alt landið. Á Bileftirlitinum starvast 17 fólk.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Frá Kommunalu brennistøðini á Sandvíkarhjalla. Blaú posarnir til vandamikið burturkast verða bornir út í komandi viku.

Posarnir verða heintaðir aftur vikuna eftir. Vegleiðing um vandamikið burturkast er á posanum.

Kommunala brennistøðin á Sandvíkarhjalla

SNARSKIVAN

The Windsmith
v/ John S. Müller

Ring og royn
eitt blásaraljóðføri við ráðgeving frá útbúnum og royndum fakmanni

Søla
Nýggj Yamaha blásaraljóðføri tøk

Tænasta
3 mðr. ókeypis fínstilling av ljóðførum, sum latin eru av blásaraverkstaðnum við Marknagilsvegin 18

fartlf. 219721 · e-mail: windsmit@post.olivant.fo

sjónvarp

KPMG

Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara verður søkt eftir bókhaldara at byrja skjótast til ber.

Starvið
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, fevnir um alt vanligt bókhaldsarbeiði.
Bókhaldsskipanin Navision Financials verður nýtt.
Talan er um eitt avbjóðandi og áhugavert starv.

Umsøkjarin
Tann, sum settur verður, skal hava kunnleika til bókhald, kunna arbeiða sjálvstøðugt og annars verða fyrikomandi og fryntligur.
Kunnleiki til bókhaldsskipanina Navision Financials, er ein fyrimunur, men eingin treyt.
Lønin verður sett eftir nærri avtalu við atliti til royndir og útbúgving.

Umsóknin
Umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til KPMG statsaut. revisorar Sp/f skjótast til ber og í seinasta lagi 10. desember 2001.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Paula Ellefsen ella Rúna Poulsen á telefon 34 34 34.

Allir fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

KPMG statsaut. revisorar Sp/f
Postsmoga 3258, FO-110 Tórshavn
Tel. 34 34 34, Fax 34 34 35
Heimasíða: www.kpmg.fo E-mail: kpmg@kpmg.fo

Hús til leigu

Dupulthús til leigu við Villingardalsvegin við sera góðum útsýni.

1. hædd: gongd, bryggers, stórt baðirúm við bað og brúsu og stórum klædnarúmi og tvey verilsir.
2. hædd: wc, sovikamar, køkur, stova, gongd og altan + ovasta loft. Eisini er møguleiki at leiga stóra garasju,ið hoyrir til húsini.

Helst leigusáttmáli í min. 2 ár, til fólk, ið fara væl um ella fyritøku. Prísuppskot 8.000,00 + ljós og hita.

Bill. mrk. 3388

Skúlaleiðari til Skála skúla

Av tí at skúlaleiðarin fer í farloyvi 1 ár (frá 1. januar 2002 til 1. januar 2003) verður søkt eftir avloysara í tíðaravmarkað starv hetta tíðarbilið.

Nærri fæst at vita, hvørjar skyldur eru at røkja við at ringja til skúlaleiðaran tlf. 441368 (skúlin) ella 441539 (heima) ella við at senda teldupost til sunik@skulin.fo

Starvið er lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 27.4 – 31.2.

Skrivlig umsókn skal vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. november 2001 kl. 18.

Skúlastýrið fyri Skála skúla
Rosa Prestá, formaður
FO 480 Skála
tlf. 441040

Restorffs ASSU

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

VEGG SAGING Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.	HOL SAGING Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
GÓLV FRESING GÓLV SLÍPING	GÓLV SAGING Rennir, keiðki, asfalt, uppteka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin 31/8 00

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VW GOLF 3
turbo diesel 1,9, árg. 92, við nýggjum motori, til sølu.
Tlf. 375186

TIL SØLU
Ein VW transporter, árg. 89, nýsýnaður. Toppstykkið er farið.
Tlf. 223857 / 455986

VW GOLF III
1,9 Turbo diesel 79 Hk, er til sølu, um hóskandi boð fæst. Bilurin er frá september 1993 og hevur koyrt 220.000 km. Er væl viðfarin.
Tlf. 215727

YNSKIST
Dieselmotorur í góðum standi, til ein Nissan Bluebird ynskist til keyps, ella ein bilur, ið hevur dieselmotor (Nissan Bluebird)
Ring tlf.257484

YNSKIST
Er tað nakar, ið hevur ein gearkassa til Mitsubishi Lancer GLX ella Colt til sølu, so ring vinarliga á
tlf. 222941

YNSKIST
Eykalutir til Toyota Carina 2, árg. 89.
Tlf. 226772

OPEL ASCONA
til sølu fyri 3.000 kr. Sýnaður í 01.
Tlf. 224140

4 PÍKADEKK
á felgum, std. 185/65-14, við orig. skálum, til Nissan Almera, til sølu fyri 2.500 kr.
Tlf. 448841

TIL SØLU
Toyota Corolla, árg. 86, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 220121 - 253761

VW JETTA 1.6
155.000 km, árg. 86/87, koyrir fínt, alt fungerar, 4 summardekk á felgum, 4 nýggj pikadekk á felgum. Prísur 14.000 kr.
Tlf. 223980

CITROEN XANTIA 1,9 TD
til sølu. Hevur koyrt 84.000 km, árg. 96, ongan skaða, hevur 10 stk fløgusspælara, sportfelgur, nýggj dekk, avtakiligan campingkrók. Bilurin sær gott út og er í besta standi, kom og royn hann. Prísur 95.000,-
Tel. 354353 ella 214699

TIL SØLU
Takboylar, passa til Honda Accord, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 319310

TIL SØLU
Tvey Bridgestone pikadekk til sølu fyri 300 kr. stk. Stødd 165 R 13.
Tlf. 319310

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
Árg. 89, el-rútar, el-spegl, sentrallás, aut. gear, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 223203

MITSUBISHI COLT
árg. 85, til sølu sum eykalutir.
Tlf. 224463

JEEPUR
Mitsubishi L200, árg. 2000, koyrt 23.000 km, til sølu. Eyka felgur fylgja við.
Tlf. 314709

TOYOTA AVENSIS
Reyður, árg. 8/99, koyrt 27.000 km, til sølu fyri 133.000 kr.
Tlf. 448902

FORD FIESTA 1.8 DIESEL
árg. sept. 1998 til sølu, pikadekk á felgum fylgja við. Koyrt 80.000 km, prísuppskot: 95.000 kr.
Tlf. 443156

TIL SØLU
17" felgur við dekkum 225/45-17 til Mercedes. Hava koyrt 2.000 km. Nýprísur við 2 cm. sporvíðkara 17.500 kr. Til sølu fyri 10.500 kr.
Tlf. 312880 - 251158

FELGUR
til VW Passat, 15" til sølu fyri einans kr. 1.000,00
Tlf. 448410

MERCEDES 280 SE
árg. 84 bíliga til sølu. Sýnaður 7/01.
Tlf. 312880 - 251158

TIL SØLU
4 felgur á summardekkum (175x14"), av einum Toyota Corolla, árg. 96, til sølu.
Tlf. 215390 - 252423

GEARKASSI YNSKIST
til WV Passat diesel L6, árg. 88/89, ella bilur, ið kann nýtast sum eykalutir.
Tlf. 332319 / 257593

TOYOTA CAMRY
árg. 86, hevur koyrt 215.000 km, sýnaður 8/2001, til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 213858, e. kl. 17

HONDA ACCORD 2.0 EXI
til sølu vegna flyting. Hevur nógva eyka útgerð. Prísuppskot 85.000 kr. Ring og hoyr nærri á
tlf. 256460

HONDA ACCORD 2.0 EX
árg. 87, er nýsýnaður, til sølu fyri uml. 12.000 kr. ella í býti við scootara.
Tlf. 252653

VOLVO 244
Volvo 244, árg. 81, bíliga til sølu. Er í góðum mekaniskum standi. Nýsýnaður.
Tlf. 373889

SUBARU LEONE 1,6
Árg. 88. Prísuppskot 7.000 kr.
Tlf. 319325 - 250550

DAIHATSU CHARADE
Árg. 88, koyrt 93.000 km. sýnaður í 2000. Hevur nýggj dekk. Til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 224414

TOPPSTYKKI YNSKIST
til Toyota 1800 diesel motor model 1C ynskist til keyps.
Vinarliga ring á tlf: 220611

YARIS TIL SØLU
1 ára gamal, silvurgráur Toyota Yaris til sølu vegna keyp av stórri bili. 5 hurðar. Sera økonomiskur. Vælhildin.
Tlf. 227565 ella 216612

Amboð

TIL SØLU
Metaldreygubonkur til sølu fyri 5.000 kr. Er tveir metrar langur og hevur brúgv.
Tlf. 317414 - 226315

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
Reingeringsarbeiði ynskist eftir vanliga arbeiðstíð.
Tlf. 318334

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Næstan einki brúktur, svartur koyristólur til sølu við posa og regnslagi. Sær út sum nýggjur.
Tlf. 316240

TIL SØLU
Tvær babylíftir, 50 kr. stk. Ein grulvigarður úr træi, 100 kr.
Tlf. 319440

KOYRISTÓLUR
Myrkabláur Brio koyristólur við galesju, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 315056

RIMASONG TIL SØLU
Hvít rimasong við madrassu, undirlag og 2 facon lak, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315056

YNSKIST
Selar til barnavogn ynskjast til keyps.
Tlf. 320348 - 255959

TIL SØLU
Ein væl viðfarin Simo barnastólur (myrkabláur) við koyriposa (bláur, hvítur, reyður og beige ternut) og slag, til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 457428 - 217428 e. kl. 18

Bátaútgerð

27" GLASTREVJABÁTUR TIL SØLU
Mørebas 27 glastrevjabátur til sølu, báturin er útgjørdur við : 4 Oljutrýst snellum, 1 Kraftblokk/-Línupæl, 1 Gassfýring (heitluft í logari), 1 EL-snella, 1 GPS (Garmin 38), 1 Plottari (Ctrek), 1 VHF (Sailor), 1 16 fj. Radara (JRC 1000), 1 Farvi ekkolod (Furuno FCV-665), 1 Viking bjargingarbátur typa 04 UK, 1 Spulipumpa á dekkinum. Báturin hevur wc. Motorur er ein Ford-Saab 96 hk. Reguleringsgreiðir inni/úti. Róðurgreiðir inni/úti. Báturin hevur fiskiloyvi. Báturin verur seldur fyri 250.000,00 ella hægsta boð yvir. Áhugaðir kunnu ringja á tlf. 217487 ella eftir kl 18 á tlf 317487.
tlf. 217487

TIL SØLU
Furuno 24 fj. radari, 5.000 kr. Furuno farvuloð, 1.000 kr. Koden Loran C, 500 kr. Hálvautom. oljutrýstsnella, 2.500 kr. Dupult, rustfrí línurenna, 5.000 kr. Línurenna til føroyskan bát, 1.500 kr.
Tlf. 252546

YNSKIST
4-8 mannafar ynskist til keyps fyri uml. 10.000-20.000 kr.
Tlf. 260470

SPEEDBÁTUR
ynskist til keyps. Rana 17" ella Fletcher, men alt hevur áhuga.
Tlf. 222602

TIL SØLU
Frambygt 10-mannafar við fiskiloyvi, byggiár 1988, 24 HK Bukh, vælútgjørt, í góðum standi, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 449028 ella 223155

Bingo

RIMMAR BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum 29. nov. kl. 19.00. At vinna: før. krov, dørgurðamatur, karamellur, gávukort, dunnur o.a. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Róðrarfelag

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 1. des. kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

HEY, SUÐUROYINGAR
Rimmar jólagása bingo verður í skúlanum í Trongisvági mánakvøldið 3. des. kl. 19.00. 12 føroyskar gæs, føroyskt kjøt og nógv annað gott verður at vinna. Karamellueskja verður burturlutað millum hvørt spæl. Á lutaseðli 12 lutir, m.a. olja, gæs, føroyskt kjøt, fiskur og nógv annað gott. Eykaspæl verður eisini.
Flogbóltsdeildin T.B.

GOTT BINGO
verður í B36 húsinum mánakvøldið 26. nov. kl. 19.00. Full pláta 400 kr. Nógvir góðir vinningar, t.d. dunnur og karamellur. Á lutaseðli m.a. trý røst krov. 15 plátur fyri 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspæl aftaná. Koyring heim. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

FØROYSKT FELAG Í BALLERUP
Sunnudagin 2. desember kl. 15.00 spæla vit BINGO fyri børnum og vaksnum í »Loen« á Ryttergården í Pederstrup nærhendis Ballerup. Vinningarnir eru ferðir København/Oslo við DFDS, føroyskur matur, leikutoy og spæl, jólakurv, bøkur og mangt annað gott. Tú kanst eisini vinna APEX-ferð Danmark/-Føroyar við Atlantic Airways. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Føroyskt Felag í Ballerup

GOTT BINGO
verður leygardagin 24. nov. kl. 20.00.
Tórshøll

JÓLABINGO
AB-stuðlar skipa fyri góðum jólabingo í Róðrarneystinum á Argjum hósdagin 6. des. kl. 19.00. Tvey føroysk krov verða burturlutað og nógv annað gott verður at vinna.
Stuðlafelagið hjá Argja Bóltfelag

KAGGIN
Gott jólabingo verður leygardagin 1/12 kl. 15 fyri børnum og kl. 19 fyri vaksin. Nógvir góðir vinningar m. a. føroyskar dunnur, gæs og ræst fór. kjøt. 15 vinningar á lutaseðli m. a. jólakurvar og før. krov. Eisini verður spælt bingola og eykaspæl. Kaggin ynskir øllum sínum bingospælarum eini gleðilig jól.
Kaggin

AB-STUÐLAR
skipa fyri góðum jólabingo í Róðrarneystinum tann 6. des. kl. 19.00. Tvey før. krov verða burturlutað og nógv annað gott verður at vinna.
Stuðlarnir hjá Argja Bóltfelag

JÓLABINGO
verður í Stórhúshøll leygardagin 24. nov. kl. 16.00. At vinna verður hálvt íslendskt krov, karamellur, gardinur, eitt før. krov.
Í.F. Fótbóltur

FRÁ EYDNUNI
Gott bingo verður sunnudagin 25. nov. kl. 16.00. Eykaspælið 1.600 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

BINGO
verður í Billiardhúsinum í Gerðatúni týskvøldið 27. nov. kl. 19.30.
Vágs Billiardfelag

JÓLABINGO
Stórt og gott jólabingo verður í Pálsstovu hóskvøldið 29. nov. kl. 19.00. At vinna verður m.a.: Uttanlandsferð fyri tvey, Nintendo 64, turt kjøt, ræst kjøt, gás, rækjur, karamellur, ferð við Norðlýsinum og grindaknívur. Eykaspæl verður.
9. B í Kommunuskúlanum

JÓLADUNNUSPÆL
Gott jóladunnuspæl verður í Sandvík 27. november.
Bygdarfelagið á Rananum

Burturm. /funnið

SILVURKROSSUR
við ketu burturmistur vikuskiftið 26-27 okt. Um onkur hevur funnið hann, vinarliga ring á
tlf. 313914

HARRA HÁLSKETA
úr silvuri burturmist náttina til leygardagin 17. nov. í miðbýnum í Havn. Óivað tætt við Steinatún. Hevur tú funnið hana, vinarligast ring til mín,
Tlf. 255215

HJÁLP YNSKIST
Hevur nakar funnið mína Nokia 3310 mobil, ið eg misti í Havn fríggjadagin 16. nov., so ring á
Tlf. 423592 – takk

KETTA HORVIN
Grástiput ketta horvin fyri umleið 4 vikum síðani. Hon heuvr eitt lilla hálsband. Um nakar hevur sæð hana so ring vinarliga á
tlf. 319637

Býli

ÍBÚÐ/HÚS YNSKIST
Íbúð/hús ynskist til leigu í Eysturoynni, helst í Runavík ella nærhendis.
Tlf. 449785 ella 255927

LOFTSÍBÚÐ
v/ sera góðum útsýni , til leigu.
Tlf. 261604

VERILSI/LÍTIL IBÚÐ
ynskist til leigu í Fuglafirði. Alt hevur áhuga.
Tlf. 250196

ÍBÚÐ SØKIST
Einlig 37 ára gomul kvinna søkir íbúð í Havn ella nærhendis.
Bill. mrk. 26-1

VERILSI TIL FRAMLEIGU
Verilsi í Hvidovre til framleigu frá 1/2-2002 til 1/8-2002. Tað er á einum kollegium, har tú hevur felags køk. Tað er sera gott samband við bussi inn til býin, bæði um dagin og um náttina. Leigan er ca. 1500,- um mánaðin. Nærri boð um verilsi og hentleikarnar á kollegiinum, kunnu tit fáa við at skriva mail til:
jt71fo@hotmail.com

KJALLARI Í SKOPUN
Kjallari í Skopun til leigu. Uppi í Gerðinum. Kann nýtast sum handil, goymsla, skrivstova, e.l. um áhugi er
tlf. (0045) 75141075/40288075

ÍBÚÐ Í BIRKERØD
3-verilsis íbúð, 70 kvm. til støddar við terassu, til framleigu í eitt ár frá 1. januar 2002. Friðaligt umhvørvi, og frástoða til København 25 min. við toki. Leiga kr. 6500 pr. mð.
Ring aftaná kl. 18 á tlf. 0045-45815627

EINLIG MAMMA
við 8 ára gomlum soni ynskir íbúð skjótast gjørligt. Eri at hitta á
tlf. 318562 ella 226287

TIL LEIGU
Til friðarlig og røkin fólk, er ovara hædd í húsum undir Varða í Havn, til leigu frá 01.12. Íbúðin, ið er ca. 90 kvm. hevur dur, gongd, 3 kømur, baðirúm, stovu, køk, hjall og vaskikjallara. Húsini liggja í sera friðarligum umhvørvi við blindveg, sera gott útsýn yvir Havnina. Dentur verður lagdur á at leigarin fer væl um, og leigumáli verður í eitt longri tíðarskeið. Boð undir 6.000,- uttan hita/el hava ongan áhuga. Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn
Bill.mrk. 1224-2

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Bræveskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……....

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki